# BLÁI STÓLURIN



## Elis Poulsen, útvarpsvertur, 53 ár

# »Eg fari upp uml. kl. 5.15«

**Lýs teg sjálvan við trimum orðum:**
Takksamur fyri lívið.

**Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?**
– Góða/góði! Kanska serliga um konuna.

**Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?**
Eg hyggi altíð eftir heildini.

**Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?**
Eg fari altíð tíðliga upp – um kl. 5.15. – og nýti í mesta lagi 30 min. til at gera meg kláran. Síðan beri eg konuni kaffi á song hvønn morgun.

**Hvat stressar teg?**
Eg veit ikki um nakað, ið stressar meg. Eg tveiti altíð tað frá mær, ið møguliga kann stressa meg.

**Hvat gleðir teg?**
Tá tað gongst familjuni væl. Ella yvirhøvur tá onnur hava tað gott.

**Nær feldi tú seinast eitt tár?**
Í november mánaði, tá beiggi mín doyði í einum ferðsluóhappi, tá feldi eg fleiri tár.

**Nær smakkaði tú tær seinast á?**
Fyri tveimum vikum síðani tá eg var í silvurbrúdleypi hjá systkinabarninum og manni hennara. Tað var ein rimmar veitsla – haldi eg dansaði út í eitt til kl. 4 á morgni

**Hvat var tað seinasta ynski, tú fekst uppfylt?**
Tá alt eydnaðist væl hjá dóttur míni eftir sjey ára langa sjúkralegu.

**Hvar arbeiðir tú?**
Í Útvarpinum.

**Hvørji ráð hevur tú til fólk, ið ætla sær at fáast við útvarp?**
At vera tann tú ert.

**Hvat er besta uppfinningin?**
Lekjandi heilivágur.

**Hvat hevur tú í lummunum beint nú?**
Um tað var konan, ið skuldi svarað, hevði hon sagt: ”leysar pengar”. Men júst nú havi eg bert eina kvittan fyri døgurðamatin, eg júst havi etið á Sjónmansheiminum, og mínar lyklar.

**Hvat er títt besta heimaráð?**
At skapa hugna og trivna heima. Annars at loysa trupulleikar beinanvegin – áðrenn teir koma ov nær og mennast.

**Hvør er stuttligast í Føroyum?**
Tað eru ómetaliga nógv stuttlig fólk í Føroyum, men tá eg flenni mest, eri eg saman við vinmonnunum Harry og Martin. – Vit kunnu sita uppi eina heila nátt og flenna, og tá er eingin húsfriður

**Hvør er keðiligast í Føroyum og hví?**
Áðrenn nakar so keðiligur kemur mær nær, eri eg langt síðan farin frá tí persóninum.

**Hvussu ofta speglar tú tær?**
Eg noyðist at spegla mær, tá eg raki mær, og tað er av neyð.

**Hvussu ofta ert tú til frisør?**
Eina ferð um mánaðin.

**Hvør er tín stuttligasta uppliving í útvarpinum?**
Tað hevur verið ógvuliga stuttligt, tá Øssur, Kári og eg hava verið uttanlands saman. Eitt tað stuttligasta var helst, tá Finnur Olsen og eg gjørdu eina sending saman ,’Av grøna báti yvir á Crown of Skandinavia’. Og brádliga misti Finnur ljóðbandið, ið fór rullandi eftir gongini – bert ein minutt áðrenn vit skuldu í luftina. Og hvat skuldu vit nú gera? Vit máttu bara byrja at senda sendingina og rulla ljóðbandið upp so við og við. Tá vit so loksins fingu spolan á bandavspælaran, lógu vit flatir á gólvinum og flentu.

**Hvør er tín keðiligasta uppliving í útvarpinum?**
Tá sendingin ’Hvat nú?’ varð tikin av skránni.